# Victor á Lakjuni

Í summar verða 25 ár liðin, síðani handilin hjá Victor á Lakjuni í Klaksvík lat upp á fyrsta sinni. Tað vóru hjúnini Victor og Marjun á Lakjuni, sum byrjaðu arbeiði, og tey bæði hava eisini rikið handilin líka síðani.

Victor á Lakjuni hevur í løtuni fleiri fólk í arbeiði, og tey hava øll úr at gera. Tey arbeiða við fleiri stórum verkætlanum, so har er nokk at takast við.

Handilin hjá Victor á Lakjuni selur at kalla alt, sum hevur við hita, vatn og sanitet at gera. Handilin hevur eisini selt møblar til baðirúmið í fleiri ár, men fyri einum ári síðani lótu tey eina nýggja avdeiling upp í handlinum.

- Fyri einum ári síðani gjørdu vit eina nýggja avdeiling bert við baðirúmsmøblum, og hetta hevur riggað stak væl. Úrvalið hjá okkum er nógv størri nú, og sølan hevur eisini gingið sera væl hetta árið, sum avdeilingin hevur verið opin, sigur Marjun á Lakjuni.

*Í summar verða tað 25 ár síðani, hjúnini Victor og Marjun á Lakjuni byrjaðu við arbeiðnum hjá Victor á Lakjuni*





















